## Møti og gudstænasta

**Sundalagsstevna:** Hóast ein stórur partur av stevnugestunum munnu fara til dystin í Formuladeildini millum EB/Streym og KÍ, fara uttan iva fleiri fólk at lurta eftir útifundinum sum verður leygarkvøldið kl. 20. Hetta útimøtið verður beint við missiónshúsið í bygdini og er tað vestmenningurin, Jóannes Fonsdal sum skipar fyri saman við øðrum fólki. Annars verður gudstænasta sunnudagin kl. 12 í Hvalvíkar kirkju, har Marjun Bæk prædikar.



## Seinasti dansurin

**Sundalagsstevnan:** Leygarkvøldið á midnátt verður serstakur dansur í Eydnuni á Oyrarbakka. Her fer kendi bólkurin »Showmenn« at spæla – og sum skilst er hetta seinastu ferð teir verða at hoyra. Sagt verður frá, at bussur fer at koyra millum Hósvík og Eydnuna í samband við dansin, sum endar kl. 04.

# fótbólt



### Taptu ímóti HBa

Í steypakappingini lá betri fyri teimum, og tað var rættiliga nær við at teir komu í sjálva finaluna.

Teir spældu ein undandyst ímóti besta liðnum hjá HB, og vóru í roynd og veru frammanfyri 2-1. seint í dystinum.

Men í seinastu minuttunum fingu teir ein mann vístan av vølli, HB fekk brotsspark og endaði dysturin at enda við sigri til HBa.

– Tað var eitt sindur keðiligt at vit soleiðis skuldu tapa 3-2, slær Jógvan fast.

Á Sundalagsstevnuni skulu teir spæla dyst móti AB. Teir hava áður spælt móti hesum liðnum, og vunnu tá stórsigur – 7-2.

– Men ein má ongantíð taka nakran dyst ov lætt, staðfestir Jógvan, sum spælir mitt á miðjuni hjá smádreingjunum.

### Góðar umstøður

Umframt spæl sítt á sjálvum vøllinum, er hann eisini ein íðin áskoðari, tá besta liðið hjá EB/Streymi spælir sínar dystir.

– Eg havi sæð allar dystirnar í ár, undantikið tveir, sigur Jógvan.

Hann heldur sjálvur at Formula-liðið er sera gott. Og nú fáa teir so bæði leikvøll og fáa handað felagshúsið um vikuskiftið.

– Nú skuldu verið góðar umstøður hjá felagnum at kunna blivið enn betri, slær hann fast.

## Mála hús til stevnu

**Streymnes:** - Hetta er annað árið at eg máli húsini. Nústani verða tey liðug, sigur Eyðun Andreasen.

Eyðun siglir annars út við einum av skipunum hjá føroyska reiðarí'inum THOR í Hósvík.

Nú hann er heima var hann farin undir at mála húsini saman við soninum. Ætlanin var at fáa tað gjørt í fjør, men tá viðraði so stak illa.

- Ja, vindeyguni trongdu harðliga til máling, sigur Eyðun.

Feðgarnir báðir málaði báðir við góðum huga í góðveðrinum fyrrapartin í gjár – hann vindeyguni á altanini og sonurin klæðningin.

Aftaná tað var ætlanin at grundin skuldi hava ein umgang við málingini.



*Eyðun í ferð við at mála vindeyguni á altanini í góðveðrinum í gjár*
*Mynd: Snorri Brend*

- Ein má brúka góðveðursdagarnar, tá teir eru her, sigur hann.

## Út í sólina at trilla



*Tær tríggjar saman við børnunum. Vinstrumegin Birna við Brandi Gunnari, Hannusi og Sólbjarti; Eilin við Karini og Teituri, og Fríðbjørg við Nataliu, Jóhan Eli og Lars Gunnari*
*Mynd: Snorri Brend*

**- Vit eru bara farnar ein lítlan túr í góðveðrinum, siga tær tríggjar, Birna, Eilin og Fríðbjørg. Tær arbeiða á vøggustovuni við Kráir.**

**Hvalvík:** Tá veðrið er soleiðis er bara eitt at gera: Fara út í barnagarðin ella fara útum barnagarðin.

Tær tríggjar valdu tað seinna. Tóku nøkur børn við sær og fóru so ein gongutúr gjøgnum bygdina fyrrapartin í gjár.

- Vit hava øll børnini við sum kundu. Onkur lá og svav, og tey komu so ikki við í dag, siga tær.

Eftir í vøggustovuni var ein annar starvsfelagi, Kára sum hevði lovað at hava ein døgurðabita kláran á middegi.

- Vit gleða okkum at koma aftur til ein góðan grýturætt, siga Birna, Eilin og Fríðbjørg.

**sb.**